# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Festivalar til fólkið

Ikki meira enn er G! festivalur og ólavsøka farin aftur um stendur enn ein stórur festivalur á skránni. Hetta vikuskiftið verður Summar Festivalurin hildin í Klaksvík, og talan verður eftir øllum døma um størsta tiltak av sínum slag nakrantíð. Nógv verður gjørt burtur úr við tøkni, tónleiki og umstøðum annars, og áhugin fyri tiltakinum er sera stórur skilst. Sosialurin hevur sum blað og sum tíðindaveitari á Planet og Portali sett sær fyri at gera nógv burtur úr tónleikalívinum sum heild og harvið eisini teimum spennandi festivalunum. G! fekk nógv uppiborið pláss, og nú stendur so Summar Festivalurin fyri framman. Í Sosialinum í gjár varð stórt eykablað um festivalin. Vendið tykkum til okkara, um tit ikki hava fingið eykablaðið.

Festivalarnir eru annars blivnir nýggj samlingspunkt í føroyska summarinum, og Summar Festivalurin, ið nú er fyri framman, er eitt gott dømi um, hvussu tað ber til at savna fólk í øllum aldri til eitt hendingaríkt og spennandi vikuskifti við tónleiki, fólkalívi og undirhaldi annars.

Fólk hava meira frítíð, enn tey plagdu at hava, og eitt rák er, at fólk vilja keypa sær innihald í síni frítíð heldur enn at skapa tað sjálvi, og her hava festivalarnir eitt tilboð, ið fólk taka av. Tað er spennandi at savnast við so nógvum fólki á einum festivaløki, har heimskendir bólkar og føroyskir tónleikarar spæla og undirhalda í fleiri dagar. Lagið er gott, prátið er hugnaligt, og upplivingarnar eru ríkar.

Summar Festivalurin er ein rættilig sólskinssøga í føroyskum mentanarlívi. Festivalurin er sprottin burtur úr ongum og hevur eftir trimum árum vaksið seg til ein altjóða festival, sum er fult á hædd við festivalar í londum rundan um okkum. Áhoyrartalið er vaksið á hvørjum ári, og Summar Festivalurin hevur ongantíð áður lagt so nógv fyri, sum festivalurin ger júst í ár. Stóru tøkniligu útbyggingarnar skulu tryggja, at stórir og kendir bólkar úr útlandinum kunnu koma til Føroya at spæla, og hetta spennandi hugskotið skal í ár veruliga standa sína roynd við týska superbólkinum Scorpions.

Tað vil altíð vera talan um eina javnvág, tá skipað verður fyri festivalum – nær eru vit mettað. G! og Summar Festivalurin eru so komnir fyri at verða. Helst eisini Fjarðarfestivalurin. Umframt at hesir festivalar eru undirhald og kunnu geva okkum íblástur uttanífrá eisini, so eru teir eisini ambassadørar fyri Føroyar og føroyskan tónleik og mentan.

Vit kunnu bara fegnast um hesi nýggju og spennandi tiltøk í Føroyum, og vit vóna, at tað liggja nógvar spennandi og hugaligar upplivingar fyri framman. Vit ynskja øllum ein góðan Summarfestival.

**Sosialurin**

## Forbedring på vej?

**Tórshavn bruges som ét stort toilet. Sig JA, til forbedringer !**

JESPER ULLUM SUNDIEN

- Hvor er det synd og flovt at vi skal gå rundt i pis og bræk i Tórshavn by.

Som reglerne og holdningen er nu kan alle stille sig op på offentlig vej og lette trykket uden bekymringer for eftervirkningerne.

Gad vide hvor mange mennesker der stiller sig op foran deres egen indgang og pisser?

For på Færøerne findes ingen regler om urinering på veje og gader.

Men det må ændres da det er et stort minus for så smukt et land. Selv turisterne er forarget at i året 2007 kan man på Færøerne gå rundt og pisse som dyr.

Jeg er ikke historiker men mener det var Grækerne der tidligt så problemet med hygiejne i deres byer og byggede kloakering netop for at forbedre sig.

Selv ved Millitæret når der er øvelse og Kompagniet har slået lejr i skoven for natten bliver der i hver Deling udpeget 2-3 personer som har til opgave at finde det bedst egnede sted for Latrin (toilet). Her graves et dybt hul, og laves en primitiv form for toiletsæde. Når så stedet forlades dækkes hullet til med jord og naturen overtager. Herved undgår man at det flyder med pis og afføring i hele lejren. Og alt affald bliver samlet op og tages med til Kasernen, så naturen ikke belastes.

Selv til festivaler er der sat WC-vogne op.

Jeg har forretning nede i midtbyen og ved indgangen er der efter hver weekend fyldt med den syrlige og væmmelige stank af pis og bræk som jeg må fjerne med stor ubehag og kun fordi der ikke findes regler mod dette, men det kan jo forbedres ved at lave en lov om det. Man ser det jo i andre lande fx Danmark hvor det koster en bøde at urinere offentligt.

**-"Ryd op efter dig selv, din mor er her ikke!!!"**

Et andet punkt hvor vi må forbedre os er oprydning efter hver weekend i midtbyen. Hver morgen bruger vores Kommunale og offentlige fejemaskine timevis på oprydning, efter natternes fest, på bekostning af Statskassen.

Men hvad er det egentlig de fjerner? Det er Pizzabakker, glas; affald efter Diskotekerne og de steder der sælger mad/Pizza til de sultne.

Burde det ikke være dem der sælger varene der skal sørge for oprydningen og ikke Hr. Og Fru Tórshavn og mig der betaler? Jeg fjerner da også mit eget skrald og kaster det ikke ud på offentlig vej! I Singapore får man en bøde for bare at smide et stykke tyggegummi!!!

Er der indtægt er der udgift og begge må stå til den berettigede som efter min mening er Diskotekerne og madstederne hvorfra svineriet kommer.

Jeg ved i Tyskland skal fx Mcdonalds sørge for at fjerne deres eget affald i en radius af 1 km. om hver Restaurant!!! Det er da en god idé og en forbedring.

Det hele er måske et spørgsmål om holdning. Holdning til tingene af Samfundet blandet med en Lov om disse emner som kan forbedres med en lillefinger fra et par Politikere, for der må være stor opbakning og flertal om dette.

## .....til "Havn" vit fara....?

KÁRI LEIVSSON

Uttan at vera "puristur" ella málsligur reinførisapostul kenni eg tað tvingandi neyðugt at koma við hesum hjartasuffi. Tað er nógv fyri at ein skal fáa ilt í málsligu tilvitskuna hvørja ferð ein koyrir inn í Tórshavnar Kommunu. Tí tað eitur nú enn "Tórshavnar Kommuna" – ella er tað nú vorðið "Tórshavn Kommuna"? Tað er í hvussu so er soleiðis ein nú verður heilsaður vælkomin við kommunumarkið. Tá hugsi eg: hvussu kunnu útlendingar læra okkara mál, tá tað almenna gongur á odda í at avlaga sjálva beinagrindina ella bygnaðin í málinum – bendingarmynstrið?

Sum ískoyti til aktuella tjakið um bókina hjá André vil eg siga, at eitt mál tolir væl at taka við orðatilfeingi úr øðrum málum og laga tað til grundleggjandi bygnaðin í sær sjálvum: grammatik, syntaks-reglur og bendingarmynstur.

Hetta gera øll mál – eisini í teim londum har ein ávís "protektionisma" er.

Mesti vandin fyri eitt mál – bæði sum samskiftisamboð og mentanarbera – er ikki orð og heiti, men tá sjálv beinagrindin fer at rilla. Tá virðingin fyri málinum er komin niður á eitt støði, har fjølmiðlar og almennir stovnar vísa líkasælu yvirfyri bendingum og rættskrivt, tá gerst tað ein ómøgulig pedagogisk uppgáva fyri okkara skúlaverk at læra børnini føroyskt - pisa-kanningar ella ei.

Tí hvussu kunnu vit rættvísgera yvirfyri børnum – ella útlendingum – at tey skulu hava bendingarlæru og rættskrivt, tá tey samstundis síggja málsligu beinagrindina avskeplaða í fjølmiðlum og almennum skeltum?

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónsleiðari:** Kári Mikkelsen
karim@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Birgir Waag Høgnesen birgir@sosialurin.fo
Joan Abrahamsen joan@sosialurin.fo
Henrietta Hammer henrietta@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Rólant Waag Dam rolant@sosialurin.fo
Niels Uni Dam nielsuni@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Dorit Hansen dorit@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Teitur Joensen teitur@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Ellebye Andersen alvin@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13[30]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støðd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.